


# Eingin boring í Grønlandi í ár

**Jan Müller**

24.04.2014 - 09:31

Oljan.fo

Myrkareyð tøl á niðastu reglu í roknskapinum hjá oljufelagnum Cairn Energy gera, at felagið hevur útsett alla oljuleiting í Grønlandi í óásetta tíð.

Sambært roknskapinum hevði skotska felagið 7,8 milliardir krónur í halli í fjør ímóti 2,2 milliardum krónum í 2012, skrivar Shippingwatch.

Orsøkin til tað vánaliga úrslitið er miseydnaðar leitiboringar og avskrivingar umframt eitt rættarmál við indisku myndugleikarnar um frásølu. Júst hetta seinasta var ætlað at bøta eitt sindur um roknskaparúrslitið.

Higartil hevur Cairn Energy brúkt góðar tvær milliardir krónur upp á leitiboringar í Grønlandi, og tær hava ikki givið nakað úrslit.

Avgerðin hjá Cairn Energy at útseta leitingina í Grønlandi ber í sær, at eingin oljuboring verður í grønlendskum øki í ár, tí einki av hinum feløgunum, sum hava fingið leitiloyvi,

hava boðað frá, at tey ætla at seta borin í havbotnin í summar. Tí verður fyrsta royndin í fyrsta lagi næsta ár, sigur grønlendska kringvarpið.